# VEÐRIÐ Í KOLLAFIRÐI



# JUNI 2024

# VEÐURSTOVA FØROYA

**Dagfesting**: 12. juni 2024

**Staður**: Sundsvegur 70 – 410 Kollafjørður (bátafelagið)

**Heimildarfólk:** Høgni Joensen, Sigurd Jacobsen, Harald Haraldsen, Heðin Hansen (80 ár í dag), Jens Marni Hansen, Kristian Jensen, Sjúrður Hammer, Svanberg Petersen, Jóhan Joensen, Jóan Petur Petersen, Immi Dam, Tummas Johansen, Martin Davidsen, Bjarni Petersen (bjarni.petersen@gmail.com), Kjartan í Homrum, Jóhannes Hansen, Dan Joensen.

**Viðtal við**: Hanus Kjølbro

Fyri at fáa greiði á hvussu veðrið er á teimum ymsu ættunum í Kollafirði, setti undirritaði seg í samband við Jóhan Joensen, skipara úr Kollafirði.

Hann bjóðaði mær til bátafelagið í Kollafirði at gera samrøðu við allar menninar har.

Við til samrøðuna hevði eg spurnarblað – til allar 16 ættirnar, ið vanliga eru umtalaðar í bygdini:

- Er vindurin javnur ella ójavnur á ættini
- Er meira vindur í ættini enn aðrasteðs – ella øvugt
- Er ættin vát – t.e. regn, tá ið turt er aðrastaðni – ella øvugt
- Er hetta mjørkaætt?
- Er ættin vanliga ein góð ætt ella ein ring ætt – ber til at siga tað við fáum orðum?
- Onnur viðurskifti um ættina, søgur, fyribrigdi, hendingar o.s.fr.

Spurt varð somu spurningarnar ætt fyri ætt. Byrjað varð við norðan, og var farið allan kringin runt eystureftir, og steðgað var við heil- og hálv- og millumættirnar.

Spurningar og svar og aðrar viðmerkingar síggjast aftast í hesum skjali.




*Mynd 1: Tær 32 ættirnar. Til samrøðuna eru ikki allar 32 ættirnar brúktar, men onnurhvør - t.e. heil-, hálv- og millumættirnar.*

## Norðan

Norðan er besta ætt inni á fjørðinum. Lítil vindur. Hann verður ikki keðiligur, fyrr enn veðrið er ógvuliga ringt. Í Líðini er altíð gott veður á norði. Úti á fjørðinum er øðrvís, og norðan fyri Tangan – t.e. norðan fyri Kjalnes – er norðurættin ikki so góð.

Tað lotið, sum er, er javnt, og vindferðin er nógv minni enn kring landið. Norðan fyri Tangan er vindferðin tann sama ella meir enn kring landið, men vindurin er javnur.

Tað er ógvuliga lítið avfall á ættini, og norðan fyri Tangan er næstan einki avfall.

Norðan er hvørki mjørka- ella brimætt í Kollafirði.

## Landnyrðingur norðan

Landnyrðngur norðan er sum ættirnar báðumegin við. Tað kann vera tingt í sjónum sunnanfyri, men gott inni á fjørðinum.

## Landnyrðingur

Landnyrðingur er góð ætt inni á fjørðinum. Líkist nógv norðurættini. Við Sjógv er hon besta ættin. Hoyrist sjóð á morgni, tá ið hann er landnyrðingur, er ikki farandi á flot.

Er nakað av vindi, sæst ættin úti í Sundalagnum. Innanfyri er stilli, tí Kjalnestangin lívir. Norðan fyri Tangan kemur hann um sundið og liggur upp á land av Selatræ. Í illveðri av landnyrðingi flettur Bláfossáin upp um seg.

Á landnyrðingi er vanliga ikki nógvur vindur, og lotið, sum er, er javnt.

Landnyrðingur er yvirhøvur ein turr ætt í Kollafirði, líkasum norðan. Tað kann tó dríva ofta úr honum.

Ættin er hvørki mjørka- ella brimætt í Kollafirði.

## Landnyrðingur eystan

Veðrið á landnyrðingi eystri líkist veðrinum á landnyrðingi. Tá ið menn ivast at fara á flot, varð ikki engt um kvøldið til at fara við línu eysturum, um tað skvatlaði í fjøruni. tí ringt veður var uttanfyri.

## Eystan

Eystan liggur javnur inn eftir fjørðinum. Ættin er keðilig inni við kajuna inni í Firði og á Langasandi. Ættin er eitt sindur skiftandi, tí úti á fjørðinum kann vera nógvur vindur, men á Homrum (úti á Mørk) er minni.

Vindur liggur javnur inn eftir fjørðinum, og vanliga er meiri vindur enn tað er kring landið.

Ættin er ikki ein regnætt, men tað kann vera sera vátt viðhvørt.

Um summarið kann mjørki vera á eysturættini, men hon er ikki brimætt.

## Landsynningur eystan

Landsynningur eystan líkist eysturættini, og er frægari enn landsynningur. Eysturoyggin verjir fyri tí ringasta. Í illveðri fer hann niðan í Dylluna og kemur omanaftur. Í gomlum døgum var hon roknað sum skaðaætt á Lygnnesi. Flagtekjur rivu í ringum veðri.

## Landsynningur

Landsynningur kemur av Tangafirði og inn á fjørðin. Hetta er ringasta ætt á Langasandi, sum er innast á fjørðinum, og á Oyrareingjum. Hann kemur í Leitið og slær niðuraftur í sjógvin. Í einari landsynningsódn í umleið ár 2000 breyt illveður seg inn í neystini og breyt bátar.

Vindurin er javnur úti á fjørðinum, men ójavnur har inni. Í nógvum vindi tekur tað leyst millum Garðarnar, og hvirlur eru inni í firði og framm í Dal.

Norðuri í Sundinum er ættin keðilig, tó at vindurin er javnur, men hann versnar norður ígjøgnum Sundalagið. Hann er ringastur við brúnna um Streymin.

Vindferðin er nakað tann sama, sum hon er fyri landið.

Landsynningur er ein vát ætt í Kollafirði, mjørkaætt og einasta brimættin. Tað brýtur um Kjalnestanga.

## Landsynningur sunnan

Landsynningi sunnan strekkir inn á garðin á Lygnnesi, sum er besta veðurplássið í bygdini, og kastar upp á land. Er nógvur vindur, eru glaður á fjørðinum. Ættin er tann ringasta til hvirlur í Líðini, og er ring ætt inni í Firði og á Oyrareingjum.

## Sunnan

Sunnan kemur oman av Rustini og beint inn á bátahylin. Inni í Firði og á Oyrareingjum er stilli, men meira vindur og hvirlur eru úti á fjørðinum. Er stormur, kemur tað niður í Signabø og verður burtur á hinum landinum. Glaðurnar síggjast væl á fjørðinum. Fossarnir við Sjógv bretta uppum á beinum suðuri.

Framman fyri Hvannaleitið, sum er upp í Kollfjarðardali, er sunnan skaðaætt. Har liggur hann rangur

Ein veðurgarður er út fyri Kjalnes, tá ið ættin er sunnan.

Suðurættin er vát í Kollafirði. Hevur Nólsoyggin hatt, er tað uppundir regn. Hoyggingarfólk úti á Mørkini hugdu suður við Gjónna. Fór at gráta upp í grátanum, fóru tey at raka saman.

Vindurin er javnur fyri tað mesta, men hvirlur eru úti á fjørðinum.

Sunnan er mjørkaætt, men ikki brimætt.

## Útsynningur sunnan

Útsynningur sunnan líkist útsynningi. Ættin hevur ikki somu hvirlur sum útsynningur vestan.

## Útsynningur

Útsynningur kemur oman ígjøgnum dalin og eg ein góð góðveðursætt.

Er illveður, er hetta ringasta ætt á Lygnnesi. Nógvar hvirlur og skaðaætt. Vindurin liggur og kastar, og nógvir bilar eru farnir útav í rundkoyringini í illveðri. Bingjur á havnalagnum eru tiknar upp og slongdar út á fjørðin.

Einaferð varð ein kúgv sogin uppeftir, so at hon stóð upp eftir enda. Hon fekk bert lítlan skaða av hendingi. Eisini er ein blandimaskina tikin eitt sindur upp, har hon blandaði betongið víðari í leysari luft.

Ein hvirla sló einaferð niður inn við Geytakajuna og tók ein bát upp, sum lá har fullur við sjógvi. Hann var bundin við báðar kajurnar. Hann mól runt í luftini, bleiv tømdur og lagdur niðuraftur, har hann hevði ligið áðrenn.

Ímillum hvirlurnar kann vera so stilt, at fólk kunnu fara útum við kertuljósi.

Yvirhøvur er útsynningur ójavnur, og vindferðin er meiri, enn hon er kring landið.

Útsynningur er regnætt í Kollafirði. Tey nevna hana sum madamman við pøsini. Tá ið bóndin í Miðgerði hoyggjaði, rakaði hann saman beinanvegin, hann sá fyrsta ælið koma. Tað triðja ælið strekti út á Miðgerði – t.e. út á Kjalnes.

Tað er ikki vanligt við mjørka á útsynningi. Er mjørki, er hann mest ovarlaga. Tað eru eysturættirnar, sum eru mjørka ættir.

Útsynningur er ikki brimætt í Kollafirði.

## Útsynningur vestan

Lítil munur er á veðrinum, tá ið ættin er útsynningur vestan, og tá ið hann er vestan.







## Vestan

Vestan kemur omanav og fer beint út eftir fjørðinum. Er illveður, buldrar hann í fjallið á sunnaru síðu á fjørðinum, og áirnar í Signabø renna niðaneftir.

Vindurin er javnur, og vindferðin er tann sama sum fyri landið.

Norðan fyri Tangan vita tey ikki av ættini. Hon er so góð norðuri í Sundinum, at tey vita ikki um so veðurgóða ætt nakra aðrastaðni í landinum.

Ættin er ikki serliga vát. Tað regnar bert úr brúgvaløgum, og tá ið hann støkkur vesturum, er turt og hvirlur í Líðini.

Vestan er hvørki mjørka- ella brimætt í Kollafirði.

## Útnyrðingur vestan

Veðrið tá ið ættin er útnyrðingur vestan líkist vestan.

## Útnyrðingur

Útnyrðingur kemur oman ígjøgnum Botnin og hevur eitt sindur av hvørjum við sær.

Í illveðri er hon ringasta ættin við Sjógv og út ímóti Homrum og Miðgerði. Har eru harðar hvirlur. Hann hoyrist, tá ið hann kemur, og ikki tá ið hann fer. Í Líðini er stilli á útnyrðingi.

Norðan fyri Tanga er útnyrðingur ringasta ættin. Vanliga eru 3 harðar hvirlur, so er hann farin. Fólk eru rýmd av húsum í nógvum vindi. Flýddu til grannan, stutt harfrá – og har var eingin vindur.

Hann kann liggja stutt – upp í eitt kortér ella so – men viðhvørt hevur hann ligið drúgva løtu. longsta tey vita um, er eitt korter. Fer ættin við klokkuni upp ímóti norði, verður betri veður. Fer hann ímóti klokkuni niður ímóti vestri, heldur keðiliga veðrið fram.

Vindurin er ójavnur, og harðar hvirlur eru úti við Sjógv, út móti Homrum og í Miðgerði.

Útnyrðingur er ikki vát ætt, men hevur vætu við sær, tá ið hann kemur oman úr Botni. Ein strika er á vegnum, sum vísir hvussu langt regnið strekkir.

Útnyrðingur er hvørki mjørka- ella brimætt í Kollafirði.

## Útnyrðingur norðan

Útnyrðingur norðan hevur hvirlur við sær. Ættin líkist annars útnyrðingi. Ringasta ætt á Miðgerði.